# *Betri* samfelags-tilvit

2021



betri



# Vit eru tað, vit gera

Tað er so lætt at hava vøkur orð og góð ynski. Men tá ið samanum kemur, muna føgru orðini lítið, um tey ikki verða stuðlað av gerðum



*"Nú – kanska meiri enn nakrantíð áður – er tørvur á gerðum. Handlingum. Og á einum felagsskapi, sum kann byggja brýr og seta okkum eina góða, haldføra, grøna kós móti eini framtíð, ið tekur øll við."*

EVY JACOBSEN
FORSTJÓRI Í BETRI HOLDING

Tá ið tað kemur til okkara sosialu og umhvørvisligu ábyrgd, eru vit tað, vit gera. Ikki tað, vit siga og vilja.

Tak til dømis umhvørvið. Vit vita, at vit mugu leggja um. Vit mugu gerast grønari og hugsa um okkara nýtslu. Og tað má henda nú. Tí tíðin gongur, og vit kunnu tíverri ikki angra okkum grøn.

Tí hevur Betri gjørt eina ítøkiliga ætlan fyri, hvussu vit náa málunum. Hvussu vit seta gerðir aftan fyri orðini og ynskini, og hvussu vit stig fyri stig flyta okkum inn á grønu leiðina.

Og tak viðskiftafólkini hjá Betri. Eisini her er tað galdandi, at virðið av tínum orðum bara kann mátast í tínum gerðum. Vegleiðingin og ráðgevingin, sum kundarnir fáa, má vera fyrsta floks og álítandi. Tað nyttar ikki, at vit bara ætla okkum tað ella vóna tað. Nei, vit verða dagliga máld og vigað eftir tí, vit gera.

Eftir tænastuni. Og at vit støðugt leggja okkum eftir at gera tað smidligari og lættari hjá okkara stóra hópi av ymiskum viðskiftafólkum. Tí hava vit hetta farna árið sett inn á ymsum økjum fyri at gera lívið hjá kundunum eitt vet lættari og eitt vet tryggari. Hetta er eisini orsøkin til, at vit fyri fyrstu ferð í ár fara at flyta Limakrónur beinleiðis inn á kontuna hjá okkara limum.

Heldur ikki á starvsfólkaøkinum hjálpir tað nakað bara at tosa. Í Betri samtakinum starvast 291 fólk úr øllum landinum. Tey eru ymisk. Hava ymsar lívsstøður og ymsan tørv og seta ymisk krøv til arbeiðsplássið. Men tey skulu øll hava góðar sømdir, møguleikar fyri menning og fáa arbeiðið at passa saman við tí privata. Eitt hugtak eitur "menniskjaligt haldføri", og tað er okkara uppgáva sum arbeiðsgevari at tryggja haldførið hjá okkara starvsfólkum. Vit hugsa tí í støðugt størri mun burðardygd inn í starvsfólkapolitikkin – og handla so hareftir.

Samfelagið sum heild fær heldur ikki nógv burtur úr okkara práti. Aftur her er tað einans tað, vit gera, sum hevur týdning. Tað eru møguleikarnir, vit skapa, og pengarnir, vit lata, sum hava týdning. Tað eru ítøkiligu gerðirnar, sum broyta, sum flyta, sum skapa møguleikar. Tað, sum hevur týdning, eru verk-ætlanirnar, vit stuðla. Granskingin, sum vit hjálpa til at bera á mál. Tryggleikaskapandi tiltøkini, sum vit seta fokus á og styðja. Vit vita, at vit eru stór. Vit vita, hvørja ábyrgd vit hava. Vit vita, hvat krevst av okkum. Og tað royna vit dagliga at liva upp til og vísa í verki.

Tí í øllum og einum er tað so, at vit eru tað, vit gera.

Og tíðin, vit liva í, kallar á góðar handlingar. Ikki bara ætlanir. Men verulig stig. Nú – eftir korona. Nú ið kríggj herjar í Evropa. Og nú gjáirnar, vit hvør sær grava, gerast støðugt djypri og skapa støðugt størri frástøðu millum ymisk áhugamál. Millum lokaløki. Og millum okkum menniskju.

Nú – kanska meiri enn nakrantíð – er tørvur á gerðum. Handlingum. Og á einum felagsskapi, sum kann byggja brýr og seta okkum eina góða, haldføra, grøna kós móti eini framtíð, ið tekur øll við.

Hetta er tað, vit arbeiða fram ímóti. Dagliga.

Tí at vit eru Betri – eitt felag, vit eiga í felag.


Eitt samfelag
vit eiga í felag
betri banki
betri trygging
betri pensjón
betri heim




Vit eru tað, vit gera ................ 2

ESG-tøl .................................... 7

## Umhvørvið

Heimsmálini ............................ 8

Burðardyggu átøkini í 2021 ... 16

Vit kunnu ikki angra okkum grøn ........................... 28

## Kundin

Lættari, skjótari, talgildari ... 14

Eingin orkar fyri at bíða ........ 18

Koronaflóð og -fjøra ............ 21

Ikki longur maður ella kvinna – men fólk ......... 23

IDD - License to work .......... 35

## Starvsfólkið

Starvsfólkaøkið ................... 10

Húsameklarin í Betri familjuni ...................... 12

Hvat hevði tú gjørt, um eg small beint nú? .......... 26

## Samfelagið

Eitt *safe space* fyri tey, ið hava mist alt ov tíðliga ..... 24

Bacalao – eitt paradís fyri tey aktivu ....................... 30

Vit styrkja vitanar-samfelagið Føroyar ............. 32

Betri ferðslutrygd ................ 34

Gera Suðuroynna tryggari .. 36

# *Betri* hevur sett sær hesi mál

## Vit vilja vera burðardygg

Betri vil minka útlátið av vakstrar-húsgassum við í minsta lagi 55% áðrenn 2030. Eisini gjøgnum avtalur við kundar og samstarvsfelagar skunda vit undir grøna skiftið.

## Vit vilja hava ymisleika

Starvsfólkahópur og leiðsla hjá Betri skulu endurspegla føroyska samfelagið. Hetta er við til at skapa menning og vøkstur.

# ESG-lyklatøl

## Umhvørvi

| | EIND | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| $CO_2e$, scope 1 | Tons | 500 | 518 |
| $CO_2e$, scope 2 | Tons | 265 | 284 |
| Orkunýtsla | GJ | 9.429 | 9.808 |

## Starvsfólk

| | 2021 | | 2020 | |
|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsstyrki, ársverk | 291 | | 284 | |
| Kynsbýti | Kvinnur 64% | Menn 36% | Kvinnur 63% | Menn 37% |
| Kynsbýti á leiðslustigi | Kvinnur 41% | Menn 59% | Kvinnur 41% | Menn 59% |

## Kynsbýti í nevndum

| FELØG | 2021 | | 2020 | |
|---|---|---|---|---|
| | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn |
| Betri Holding | 33% | 67% | 33% | 67% |
| Betri Banki | 67% | 33% | 67% | 33% |
| Betri Trygging | 60% | 40% | 60% | 40% |
| Betri Pensjón | 25% | 75% | 25% | 75% |
| Betri Heim | 33% | 67% | 33% | 67% |
| Betri Samtak | 46% | 54% | 46% | 54% |



THE GLOBAL GOALS

Tey 17 heimsmálini

# Ein betri heimur

Við framsøknum CSR-politikki vil Betri saman við kundum, starvsfólkum og samstarvspartum vera við til at broyta heimin til tað betra

Avbjóðingarnar í heimssamfelagnum eru nógvar, og vit vita, at tær eru átrokandi. Umhvørvistrupulleikar standa á rað saman við trupulleikum sum fátækradømi, ójavna og ófriði.

Hesar avbjóðingar eru altjóða, og tað sama eru fylgurnar. Tí er tað eisini umráðandi, at heimurin stendur saman, og at vit samstundis taka ábyrgd hvør í okkara lag. Loysnin er, at vit øll – heimssamfelagið, einstøku londini, landsins fyritøkur og hvør einasti borgari – gera okkara at virka fyri einum betri heimi. Tað hildu Sameindu Tjóðir, og tí samtyktu tær tey 17 heimsmálini, har øll 193 limalondini bundu seg til at virka fyri hesum. Einum betri heimi.

Sum størsta føroyska fíggjarsamtak - við rótum aftur til 1832 - eru vit í Betri tilvitað um, at stór ábyrgd liggur á okkum. Og hendan ábyrgdin verður tikin í størsta álvara. Tí taka vit lut í arbeiðnum hjá Sameindu Tjóðum at røkka teimum 17 heimsmálunum. Heilt ítøkiliga merkir tað, at ein framsøkin CSR-politikkur er orðaður, sum samtakið hvønn dag virkar eftir saman við kundunum, starvsfólkunum og eldsálum kring landið.

## Við hesum hevur Betri bundið seg til at

– Røkja sítt virksemi í samsvari við øll lógarkrøv á økinum

– Tryggja fult gjøgnumskygni í arbeiðnum hjá samtakinum

– Virka við ábyrgd og atliti at lokaløkjunum, har virksemi er

– Regluliga at tryggja, at alt virksemið livir upp til sett mál í CSR-politikkinum

– Tryggja í tann mun, tað er gjørligt, at samstarvspartar eisini liva upp til tey krøv, samtakið setir sær sjálvum

## Hvat er CSR?

Umhvørvislig atlit, sosial atlit og fíggjarlig atlit. Hesi trý eru bulurin í hugtakinum CSR (Corporate Social Responsibility) – hjá Betri siga vit stutt og greitt samfelagstilvit

Betri vil liva upp til tey 17 heimsmálini hjá Sameindu Tjóðunum og hevur tí orðað ein CSR-politikk, sum fevnir um:

- ✔ Mannarættindi og arbeiðsmarknaðarviðurskifti
- ✔ Umhvørvi
- ✔ Íløguvirksemi
- ✔ Sosial viðurskifti og starvsfólkaviðurskifti

# Starvsfólkaøkið

## Trivnaður snýr seg um, at dagligdagurin er góður. At uppgávurnar eru greiðar, og at samstarv og relatiónir eru góðar

Trivnaðurin er góður í Betri Banka, og her leggur stjórn, leiðararnir og HR-deildin eitt stórt arbeiði fyri, at dagligdagurin hjá starvsfólkunum skal vera góður, effektivur, og at starvsfólk skulu finna arbeiðsgleði. Trivnaður snýr seg um, at dagligdagurin er góður. At uppgávurnar eru greiðar, og at samstarv og relatiónir eru góðar. Fyri at arbeiða miðvíst við hesum hava leiðararnir árligar starvssamrøður við øll starvsfólk. Tær regluligu trivnaðarkanningarnar stuðla undir einum regluligum práti um trivnaðin á deildarstigi. Harumframt verður áhaldandi arbeitt við at menna arbeiðsamboðini soleiðis, at dagligdagurin gerst smidligari hjá starvsfólkunum.

Starvsfólkini í Betri Banka eru sera ágrýtin og arbeiðssom og leggja nógv fyri at veita kundunum eina framúr góða kundatænastu. Góður trivnaður er ein fortreyt fyri at kunna veita góða kundatænastu. Røttu førleikar eru somuleiðis ein liður í at veita kundunum ta tænastu, ið kundin hevur tørv á. Menning av førleikum fer fram í dagliga arbeiðinum og við at skipa felags førleikamenning eftir tørvi umframt førleikamenning, ið er ætlað støku funktiónini.

Regluligar kundakanningar verða eisini gjørdar í Betri Banka, soleiðis at menning og skipan av arbeiðinum altíð tekur støði í at tryggja nøgdar og loyalar kundar. Kundanøgdsemið og loyaliteturin eru stór, tað gleðast vit um, og tað gevur íblástur til víðari arbeiði við hesum.




Eg eri væl nøgd/ur at arbeiða í Betri Banka




Eg kenni meg motiveraða/n í mínum arbeiði




Um tvey ár ætli eg mær framvegis at arbeiða í Betri Banka



**Kynsbýti**

Í Betri Banka starvast 211 fólk. Av hesum eru 68 prosent kvinnur og 32 prosent menn. Í teimum leiðandi størvunum í bankanum eru 10 menn og 8 kvinnur.

# Ungur nemur

Á hvørjum ári eru nógv ung, sum vilja gerast næmingur í Betri Banka. Vit hava síðan 2007 tikið 6-9 næmingar inn um árið. Tilsamans hava vit havt 107 næmingar í læru hesi árini. Av teimum eru framvegis 33 útlærdir næmingar, sum arbeiða í samtakinum.



# Húsameklarin í Betri familjuni



Betri Heim rekur eitt øðrvísi virksemi enn restin av Betri familjuni. Í Betri Heimi selja vit fastognir, og hóast vit ikki eiga vøruna sjálvi, men umboða seljaran í søluni, so vilja vit eisini geva okkara íkast til at gerast orku- og umhvørvisvinaligari.

**Orkumerkt sethús**

Vit vildu fegin sett orkumerki á sethúsaognirnar, ið vit selja. Í londum kring okkum finnast orkuskráir, og í hesum skráum verða sethúsaognir orkumerktar. Slík skrá finst ikki í Føroyum enn, og um politiskur vilji er til tess, ynskja vit í Betri Heim eina slíka skrá og vilja geva okkara íkast at orkumerkja føroysku sethúsaognirnar.

**Eitt grønari Heim**

Innanhýsis gera vit okkara til at hugsa umhvørvisvinaligt. Vit hava ment talgildar skipanir til skjøl og boðgeving, so minni verður skrivað út á pappír. Í tí heilt smáa, sum eitt nú við ruskposum, brúka vit felags ruskílat heldur enn at hava ruskíløt undir hvørjum skriviborði. Vit reisast oftari av stólunum, og talið á ruskposum er minkað árliga úr 2080 niður í 520. Allur bati bøtir.

Betri Heim koyrir enn við bensin- og dieselbilum. Avgerð er tikin um at skifta bilarnar út við el-bilar, næstu ferð bilar skulu keypast, áðrenn 3 ár eru liðin. Hetta fer at gera sítt til, at vit sum arbeiðspláss gerast meira orku- og umhvørvisvinarlig.

*– Seinasta starvsfólkanøgdsemiskanningin vísti, at motivatión, nøgdsemið og loyalitetur millum okkara starvsfólk er stórt.*

KÁRA Á DUNGA
STJÓRI Í BETRI HEIM



**Nøgdsemi og loyalitetur**

Betri Heim ger regluligar starvsfólka- og kundanøgdsemiskanningar.

Seinasta starvsfólkanøgdsemiskanningin vísti, at motivatión, nøgdsemi og loyalitetur millum okkara starvsfólk er stórt. Úrslitini vóru ávíkavist 88%, 95% og 98%.

Úrslitið í seinastu kundanøgdsemiskanning var 93%, sum gevur okkum eina góða ábending um, at okkara kundar eru væl nøgdir og loyalir.

Vit arbeiða støðugt við virkis- og førleikamenning og leggja stóran dent á at lurta eftir kundum okkara og menna okkara skipanir eftir teirra ynskjum, samstundis sum vit førleikamenna starvsfólkið við røttum og viðkomandi útbúgvingum.

## Nøgdsemiskanning millum starvsfólk



# Lættari, skjótari, talgildari




Tað skal vera lættari og skjótari hjá kundunum at koma í samband við okkum og boða frá skaða. Hartil skal tað vera ómakaleysari at síggja, hvørjar tryggingar eru teknaðar, og hvør tørvurin er. 2021 var árið, tá ið vit komu við fleiri talgildum amboðum, snildari loysnum og nýggjum tænastum til kundarnar

### Mín Trygging

Er talgilda skipanin, her kundar skjótt og lætt kunnu fáa yvirlit yvir sínar tryggingar, broyta upplýsingar, tillaga tryggingarnar – til dømis innbústryggingina og boða frá skaða. Skipanin styttir um avgreiðslutíðina, tí vit skjótari fáa skaðafráboðanirnar inn í skipanina. So hvørt sum nakað hendir í málinum, fær kundin boð um tað á skipanini.

Hartil fáa kundarnir yvirlit yvir síni tryggingarviðurskifti. Her síggja teir, hvat teir hava tryggjað, hvussu nógv teir hava tryggjað fyri, og hvat vit viðmæla teimum í hesum sambandi.

Teir kunnu eisini broyta síni viðurskifti og síggja eitt høvðusyvirlit yvir, hvørjar tryggingar vit bjóða.

### Samleikin

Á Mín Trygging ritar kundin inn við Samleikanum, ið er ein føroysk loysn. Hesum eru vit sera errin av, tí Betri Trygging er eitt føroyskt felag burturav. Vit eru grundað í Føroyum, og kundarnir eiga okkum.

– Vit stuðla fegin føroyskari menning, sum flytur samfelagið framá, sigur Ingunn Eiriksdóttir, forstjóri í Betri Trygging, um Samleikan.



Vit vita, at tryggingar ikki eru fremst í huganum á fólki – soleiðis dagliga. Men tá ið tey so hugsa um tryggingarnar, ja, tá skulu tey hava lætta og skjóta atgongd til yvirlit og hjálp, sama nær á samdøgrinum tað er. Tað hava tey nú. Við nýggju talgildu tænastum okkara.

**Hevur tú tryggjað teg rætt?**

Tað kann vera trupult hjá kundunum at vita, um teir eru rætt tryggjaðir, so hvørt sum lívið broytist.

Men við eini smidligari spurnaskipan, har kundin einans skal svara fýra spurningum, hava vit gjørt tað lættari at peila seg inn á, hvørt tryggingarnar eru rættar.

Hetta ómakaleysa amboðið lættir um í skundmikla gerandisdegnum – og tað besta av øllum er, at kundin kann kanna sín tryggingartørv, tá ið tað passar honum best.

**Innbúsroknarin**

Innbúgvið. Tað broytist støðugt, so hvørt sum vit keypa afturat og fáa nýggjar ognir – hvørji jól og hvønn føðingardag. Stílurin broytist, og vit fáa betri ráð til at keypa dýrar dygdarvørur, sum vit eldast.

Men tað er kortini sjáldan, at fólk geva sær far um at dagføra tryggingarnar, so hvørt sum innbúgvið broytist.

Vit vita, at tað kann tykjast møtimikið. Og tí hava vit ment ein innbúsroknara, sum ger tað lættari hjá kundanum at fáa eina hylling á, um innbústryggingin er á eini leið, ella um hon treingir til at dagførast.

**Nýggj heimasíða**

Í heyst varð nýggja heimasíðan hjá okkum almenn. Hon ger tað lættari at finna runt ímillum ymsu feløgini, ymsu tænasturnar, átøkini og starvsfólkini.

Ein arbeiðsbólkur við starvsfólkum í Betri hevur arbeitt við nýggju síðuni og nýggju funkunum har, sum gera tað lættari hjá kundanum.







## Kundarnir eru nøgdir

Betri Trygging hevur eitt greitt mál um, at 80% av kundunum, sum uppliva skaða av onkrum slagi, skulu vera nøgdir við viðgerðina, vit veita teimum.

Síðani 2017, tá ið hesin málsetningurin varð staðfestur, hevur nøgdsemið ligið um 80% – og 2021 var einki undantak.

– Tá ið tú upplivir ein skaða av onkrum slagi, skal viðgerðin vera góð, professionell og væl grundað. Tí hava vit dugnalig starvsfólk, sum hvønn dag gera sær ómak við at avgreiða skaðarnar skjótt og væl.

– Tá ið vit aftur í ár kunnu staðfesta, at 8 av 10 kundum eru nøgdir við skaðaviðgerðina, ja, so kunnu vit eisini vera nøgd. At hjálpa kundunum í skaðastøðum er jú orsøkin til, at vit eru her.

INGUNN EIRIKSDÓTTIR
FORSTJÓRI
BETRI TRYGGING

## Lættari at gerast burðardygg




**Grønt bústaðarlán**




**Grønt billán**




**Orkulán**

Seinastu árini hava vit sett í verk nógv tiltøk, sum minka um $CO_2$-útlátið hjá bankanum. Umframt at vit hava gjørt tað lættari og bíligari hjá okkara kundum at gerast burðardygg við Grønum bústaðarláni, Grønum billáni og Orkuláni.





# Burðardyggu átøkini í 2021

Tað eru fá ár síðani, at vit fyrstu ferð gjørdist tilvitað um, at okkara virksemi hevur ávirkan á umhvørvið. Vit viðurkenna, at vit mugu gera stórar íløgur, fyri at tað skal muna.

Betri Banki hevur seinastu árini arbeitt við at gera virksemi bankans grønari eins og at minka um okkara beinleiðis $CO_2$-útlát. Harumframt hava vit gjørt tað lættari og bíligari hjá okkara kundum at gerast meira burðardygg. Vit ætla áhaldandi at tillaga og menna okkara framleiðslu soleiðis, at vit eru við til at hjálpa okkara kundum til at nýta varandi orku.

**Størstu burðardyggu átøkini í 2021**

Ein stórur partur av okkara $CO_2$-útláti kemur frá okkara bygningum og bilum. Fyri at minka um útlátið er bankin í eini tilgongd at skifta yvir til varandi orkukeldur.

Deildin í Miðvági fekk í 2021 jarðhita og brúkar nú 100% varandi orku ístaðin fyri oljufýr. Vit arbeiða í løtuni við eini ætlan at fáa allar okkara bygningar á varandi orkukeldur innan 2030.

Allar lampur á øllum okkara deildum eru skiftar til LED-ljós. Hetta minkar munandi um okkara elnýtslu.

Harumframt eru tríggir bensin-/dieselbilar skiftir út við tveir elbilar. Í hesum sambandi fekk bankin eina løðistøð setta upp við høvuðsbygningin og við deildina í Saltangará. Vit arbeiða í løtuni við eini ætlan fyri at fáa allar bilar skiftar út til elbilar innan 2030. Eisini fara vit í 2022 at byrja arbeiði við at seta løðistøðir upp til starvsfólk og viðskiftafólk okkara á deildum.

Vit hava umskipað okkara virksemi soleiðis, at vit í minsta mun ferðast uttanlands í arbeiðsørindum og heldur fundast online.

# Burðardygt vinnulív

Í 2021 gjørdust vit partur av Burðardyggum Vinnulívi, sum er ein felagsskapur við 12 føroyskum fyritøkum, sum hevur til endamáls at menna burðardyggar mannagongdir við serligum atliti at trimum ítøkiligum avbjóðingum: veðurlagsbroytingum, heilsustøðuni í havinum og minkandi lívfrøðiligum margfeldi.

Betri Banki er ein av stóru fíggjarligu stovnunum í landinum, og við tí fylgir ein stór sosial ábyrgd, sum vit eru tilvitað um. Vit hava bundið okkum til at vera við til at menna eitt burðardygt samfelag, sum vit øll eru partur av. Vit vilja verja og varðveita umhvørvið, vit gera okkara part fyri at minka $CO_2$-útlátið og gera kundar okkara førar fyri at gera tað sama.

Við at samstarva við Burðardygt Vinnulív hava vit lært meira um burðardygd og okkara ávirkan á umhvørvið. Hetta samstarv hevur fingið okkum at framskunda okkara tilgongd í at nærkast einum nullútláti.

Í 2020 hava vit roknað út, at okkara vav 1 & 2 útlát er 494 tons $CO_2$e. Vav 1 er okkara útlát frá beinleiðis oljunýtslu, og vav 2 er $CO_2$-útlát, sum stavar frá okkara elnýtslu. Sum partur av arbeiðinum í Burðardyggum Vinnulívi hevur Betri Banki sett sær hesi mál fyri 2030:

**Veðurlagsbroyting**

Í 2021 var okkara vav 1 útlát 297 tons, og vav 2 var 192 tons. Betri Banki fer at minka um vav 1 og 2 $CO_2$e-útlát við 55% í 2030. Vit miða ímóti, at allir bilar okkara eru 100% elektriskir í 2030, og vit fara at skifta oljufýrini í okkara bygningum út við varandi orkukeldur.

Vit eru í ferð við at gera útrokningar av okkara vav 3 $CO_2$-útláti, sum er óbeinleiðis útlátið frá okkara virksemi. Hetta er í størsta mun í sambandi við okkara høvuðsvirksemi, sum er at veita fígging og tænastur til okkara kundar. Vit fara í næstum at taka burðardygd við í viðgerðina av lániumsóknum og stuðla viðskiftafólkum okkara í at gerast burðardyggari.

**Lívfrøðiligt margfeldi**

Betri Banki miðar ímóti at gerast net-positivur í 2030, tá ið tað snýr seg um umhvørvisávirkan á sjógvi og á landi. Bæði hvat viðvíkur virksemi í Føroyum, okkara árini, hvar vit útvega rávørur, men eisini burturkastinum, vit framleiða. Vit ætla at fara upp í netverk, ið venda sær ítøkiliga til fíggjarstovnar sum t.d. Biodiversity Finance Pledge, og harvið samstarva við aðrar fyritøkur, sum eisini stremba eftir at minka um tap av náttúruni og venda gongdini.

Í londum rundan um okkum er ein økt lóggáva komin, sum allar fyritøkur skulu halda. Vit vilja við Burðardyggum Vinnulívi longu byrja hesa tilgongd, hóast eingin lóggáva enn er í Føroyum. Hetta tí tað er tað rætta at gera.

BURÐARDYGT
VINNULÍV

## 3 ítøkiligar avbjóðingar

- Veðurlagsbroytingar
- Heilsustøðan í havinum
- Minkandi lívfrøðiligt margfeldi



# Eingin orkar fyri at bíða

Men hjá summum kann bíðitíðin fáa varandi fylgjur. "Skjótari hjálp til skjótari bata". Tað er hetta, Betri Bati snýr seg um

Í Føroyum er kravt við lóg, at øll skulu tekna arbeiðsskaðatrygging. Men tað kann stundum tykjast, sum at tey, ið frá læknanum fáa stemplið "langtíðarskadd", hava ilt við at fáa skjóta hjálp.

Tað er ein trupulleiki. Fyri tann, sum fær skaða fyrst og fremst, men eisini fyri familjuna, fyri arbeiðsgevaran og fyri samfelagið alt.

Tað ræður um at fáa skjóta, góða og neyva hjálp, soleiðis at batin verður so skjótur sum gjørligt, og at hann verður so góður sum gjørligt.

Tí kom Betri Trygging í 2021 við eini spildurnýggjari tænastu. Ein tænasta, ið kom aftur at arbeiðsskaðatryggingini uttan meirkostnað.

Tað merkir, at at um tú í morgin fært ein arbeiðsskaða, og læknin metir skaðan gerast drúgvan, ringir ein av okkara ráðgevum til tín og prátar við teg um, hvørt tú kundi havt áhuga fyri tænastunum við Betri Bata.

**"Allur bati bøtir, siga vit, men vit vita eisini, at skjótur bati bøtir betur"**



*"Vit vita, at tørvur er á hesi tænastuni. Vit vita, at hon kann fáa avgerandi týdning fyri lív og framtíð hjá fleiri teirra, sum frameftir verða rakt av drúgvum arbeiðsskaða. Vit vita, at vit her kunnu gera mun og tryggja, at batin verður betri. Tí veita vit nú Betri Bata"*

Ingunn Eiriksdóttir
Stjóri Betri Trygging

## Betri Bati tryggjar tær

- Ein sosialráðgeva, sum kann hjálpa tær at navigera í ymsu skipanunum. Og tryggja, at tú fært tað, tú hevur tørv á og rætt til.
- At rinda fyri ávístar serlæknaviðgerðir og kanningar
- Viðgerð og uppvenjing
- Persónligan ráðgeva og toghaldara hjá Betri Trygging
- At framtíð og ynski hjá tær verða tikin í álvara
- Hjálp til viðkomandi endurbúgving um neyðugt

## 3 eyka dekningar til Arbeiðsskaða-tryggingina

Arbeiðsskaðatryggingin hjá Betri Trygging varð í 2021 víðkað við trimum eyka dekningum.

Okkara Arbeiðsskaðatrygging fevnir nú eisini um skaða á persónligar lutir, sálarliga kreppuhjálp, umframt jarðarferðarhjálp.

Tað ger, at okkara kundar eru enn betur vardir og fáa enn betri hjálp, um arbeiðsvanlukka skuldu rakt.



# Tryggiráð – har vit geva kundanum hyggjuráð

Í mai læt heimurin spakuliga upp aftur, eftir at alt hevði verið stongt í eitt gott ár orsakað av koronu.

Tað elvdi til útferðarlongsul, men tað elvdi eisini til ørkymlan, og nógv fólk ringdu til Betri Trygging fyri at vita, um tey kundu fara at ferðast, og hvussu tryggingin dekkaði, um so var.

Fyri at svara mongu spurningunum, sum kundar okkara støðugt settu um ferða- og avlýsingartryggingar, mentu vit eina netsending, har vit høvdu tveir tryggingarráðgevar – ein frá kundadeildini og ein frá skaðadeildini umframt Pál Weihe, koronuráðgeva, inni í studio.

Fyrst tóku tey saman um støðuna og góvu góð ráð hvør sær, og síðani svaraðu tey spurningum frá hyggjarum.

Sendingin varð send beinleiðis, men hon varð eisini løgd á netið aftaná. Hartil varð ein stuttur samandráttur við svarunum til oftast spurdu spurningarnar lagdur á sosialu miðlarnar.

Ætlanin er, at Tryggiráð eisini frameftir skal nýtast til at kunna viðskiftafólk um ymisk viðkomandi og átrokandi evni. Tað er okkara sosiala ábyrgd at geva burturav tí vitan, vit hava, og at samstarva við viðkomandi myndugleikar fyri at fremja og kunna um tryggleika í Føroyum.

## tryggiráð

Tryggiráð er ein netsending, sum varð ment í 2021. Ætlanin er, at Tryggiráð eisini frameftir skal nýtast til at kunna viðskiftafólk um ymisk viðkomandi og átrokandi evni.

Hvat um landið broytir lit, meðan eg eri burtur?

Eg havi keypt eina ferð, hvørjum skal eg halda eyga við, nú fráferðardagurin nærkast?

Hvat um eg fái korona, áðrenn eg fari avstað?

Hvat skal eg hugsa um, áðrenn eg keypi ferðina?

# Koronaflóð og -fjøra

Í 2021 aldaðu heimsins koronaavmarkingar aftur og fram – alt eftir lokalu smittutølunum kring heimin. Hetta elvdi serliga til ørkymlan í sambandi við ferðatryggingar, tí tilmæli og reglur broyttust støðugt og vóru ymisk frá landi til land.

Umskiftiligu viðurskiftini høvdu við sær, at tað ein dag kundi vera frítt at ferðast, men dagin eftir kundu ferðaavmarkingar– og enntá ferðaforboð – verða sett á.

Tí arbeiddi Betri Trygging nógv við at kunna viðskiftafólk um, hvussu tey skuldu gera fyri at tryggja seg so væl sum gjørligt. Bæði áðrenn tey bíløgdu ferðina, áðrenn tey fóru avstað – og eftir at tey vóru komin fram til ferðamálið.

Hóast vit spakuliga sluppu út um landoddarnar aftur, var ferðasambandið við útheimin ikki eins sterkt og áður, og tað vóru væl færri, sum ferðaðust enn áðrenn korona.

# Ferðingin nógv ávirkað av koronu

470 ferðir. So ofta dekkaðu ferða- og avlýsingartryggingarnar hjá Betri Trygging í 2021.

Hetta er minni enn helvtin av ferðaskaðunum, sum vanliga vóru áðrenn koronu, og orsøkin er allarhelst, at væl færri enn vanligt hættaðu sær at ferðast.

So hóast heimurin spakuliga læt upp aftur, ávirkaðu støðugt skiftandi koronuloyvi uttan iva framvegis føroyska ferðahugin.

# Yvir 75% av parta- brøvunum eru grøn

Tað er natúrligt at hugsa um náttúru og umhvørvi. Tí leggja vit okkum støðugt eftir at vaksa um partin av grønum partabrævaíløgum.

Í 2021 kom grøni parturin hjá Betri Pensjón upp um 75%.

Á tann hátt vita kundar okkara, at pengarnir, tey savna sær saman til pensjónina, fara væl um jørð, tilfeingi og fólk.

Pensjónsíløgurnar hjá Betri Pensjón eru grundaðar á tann veruleika, at vit bara hava eina jørð, og at hon skal endurnýtast nógvar ferðir afturat – eisini eftir at vit eru farin á eftirløn, og eftir at vit eru farin hiðani.

Tí er málið púra greitt.

Vit miða eftir at náa **100% grønum partabrøvaíløgum um 2-4 ár.**



# Ikki longur maður ella kvinna – men fólk



Kyn hevur ongan leiklut longur, tá ið Betri Pensjón metir um pensjónir og tryggingar. Avgerð er tikin um, at reglurnar, sum fyrr gjørdu mun á kvinnum og monnum, frameftir verða broyttar. Tað merkir, at tá ið útgjald og kostnaður verða roknað, er kyn ikki longur partur av roknistykkinum.

*"Vit halda ikki, at tað er rætt, at munur skal vera á kostnaði ella útgjaldi hjá kvinnum og monnum – bara grundað á, at tey eru hvør sítt kyn"*

HELGI L. PETERSEN
STJÓRI Í BETRI PENSJÓN

Vit vita, at kvinnur liva longur enn menn – statistiskt sæð. Og sum heild eru sannlíkindini fyri, at kvinnur og menn fáa tørv á ymsu tryggingunum, ikki tey somu. Tí hevur ávísur munur verið gjørdur á kynunum.

Men statistikkur og sannlíkindi, sum bara eru grundað á kyn, eru ikki longur parametur í amboðskassanum hjá Betri Pensjón.

Í 2020 broyttu vit reglurnar fyri lívrentuni á pensjónini, soleiðis at eingin munur skuldi vera á útgjaldinum hjá monnum og kvinnum.

Í 2021 tóku vit stigið víðari og gjørdu av eisini at broyta reglurnar fyri tær tryggingarnar, ið vit bjóða.

Vit viðgera sostatt ikki kundarnar sum "kvinnur" ella "menn" – men sum fólk, og tað er ein sera tilvitað avgerð.

Bæði her heima og uttanlands hevur kjakið verið heitt um júst kynsspurningin innan pensjón og trygging. Men fyri okkum er ikki so nógv at kjakast um.



Poddvarp um sorg

# Eitt *safe space* fyri tey, ið hava mist

Fyrr í ár fór Berin undir fyrstu upptøkurnar til eina nýggja poddvarpsrøð. Evnið er sorg, saknur og vón. Í hvørjum parti fortelur ein brúkari hjá Beranum um sína sorg, og sálarfrøðingur fortelur, hvat sorg er, og hvussu arbeiðast kann við sorgini



# *"Henda verkætlanin eydnast, um lurtarin kennir ein ugga"*

“Hvussu er tað at vera her aftur, Jórun?”

Niðri á keiini á Skála stendur Lív Højsted Horsdal við síni mikrofon. Hon skal hitta Jóruna, sum leingi hevur havt tað trupult við at koma júst her, tí fyri átta árum síðani doyði pápi hennara brádliga í eini arbeiðsvanlukku her á keiini á Skála.

Í dag hittast tær báðar at tosa um tað, sum er allar ringast at tosa um. Sorg, sakn og um tað at reisast aftur.

Jórun er tó í góðum hondum, tí Lív er sálarfrøðingur og starvast hjá Beranum, sum er ein felagsskapur, ið hjálpir børnum og foreldrum í sorg. Lív og Jórun hava hitst gjøgnum Beran fyrr, og Lív kennir tí søguna hjá Jóruni. Í dag hevur hon tó mikrofonina við, tí í næstum gevur Berin út eina poddvarpsrøð, sum skal hjálpa, ugga og veita ráðgeving til børn og foreldur í sorg.

Eg sakni teg - eitt poddvarp um sorg, er heitið á nýggju poddvarpsrøðini hjá Beranum, sum Betri hevur stuðlað við 100.000 krónum. Pengar, sum eru løn hjá vertinum, Lív, samskiparanum, Birgith Lassen, og tøkninginum, Høgna Fagraberg. Umframt lønir skal stuðulin eisini fíggja útgerð og marknaðarføring av røðini.

"Vit vóna at røkka so nógvum, sum til ber", sigur Oddvør Poulsen, leiðari í Beranum, sum eisini er knýtt at verkætlanini.

Endamálið við verkætlanini er at geva brúkarunum hjá Beranum møguleika at læra um, hvat sorg er og møguleika at hoyra søgurnar hjá øðrum. Tilfar, sum fyri fyrstu ferð verður útvarpað á føroyskum.

**Vilja fortelja, at onnur eru í líknandi støðu**

"Tá ið tú ert í so svárari sorg, sum tað er, tá ið tú sum barn missir mammu tína, pápa tín ella eitt systkin, ella tá ið tú sum foreldur missir barnið, so kann tað vera avgerandi at finna út av, at tú ikki ert einsamøll við tíni sorg. At tað eru onnur í líknandi støðu," fortelur Oddvør, tá ið vit hitta hana á skrivstovuni hjá Beranum í Havn. Her er fjálgt, ljóst og innbjóðandi. Tú bert eyga við smáar einglar allastaðni inni her, og ymsa staðni í rúmunum standa troystandi orð.

"Henda verkætlanin eydnast, um lurtarin kennir ein ugga," sigur Lív, sum er vertur í sendingini. Á keiini á Skála spyr hon Jóruna fyrst um ta fyrstu sváru tíðina. Hvat tað var, sum hendi, hvussu hon fekk boðini, at pápin var deyður, og hvat hendi dagarnar eftir vanlukkuna. Millum samrøðuna lesur Lív upp um sorg, ið hon sum sálarfrøðingur við arbeiðsroyndum á økinum hevur innlit í. Síðani sleppur tú sum lurtari at læra pápa Jóruna eitt sindur at kenna, tá ið Lív spyr Jóruna, hvør pápin var. Hvat var sermerkt við honum, hvat hann dugdi væl, og hvussu teirra band var. Jórun fortelur, at hon var og er babbasa genta, og at tey bæði høvdu nógvar ætlanir og dreymar saman. Hon fortelur eisini, at hon hevði ynskt, at fólk rundan um hana vóru raskari at spyrja, hvør pápin var.

"Í Beranum brúka vit okkara orku til at hjálpa teimum, sum hava mist. Men við eitt nú hesi poddvarpsrøðini kunnu vit røkka longur, og eitt av ynskjunum er heilt avgjørt, at hetta verður nakað, sum avvarðandi fara at lurta eftir, tí tað er eisini torført at vera avvarðandi til ein, sum hevur mist," sigur Oddvør Poulsen, sum hevur ein nærum endaleysan lista av hugskotum til, hvat teir ymsu partarnir av poddvarpsrøðini skulu snúgva seg um.

**Tíðin lekir ikki øll sár**

Tá ið tú missir ein, ið stendur tær nær, so er tað ikki eitt sár, sum tíðin lekir. Heldur er tað nakað, tú noyðist at læra teg at liva við. Tí verður dentur eisini lagdur á at spyrja luttakararnar í sendingini, hvussu tey hava arbeitt við síni sorg. Í síðsta parti av sendingini spyr Lív Jóruna, hvussu hon hevur tað, nú átta ár eru liðin. Hvat hon ger, tá ið hon hevur ein ringan dag, og um hon hevur nøkur góð ráð til onnur í somu støðu.

"Summi, sum eru í sorg, kunnu hava ilt við at taka stigið at tosa við ein sálarfrøðing og uppaftur verri við at møta upp til sorgarbólkar. Við einum poddvarpi kunnu tey sita heima og í sínum egna tempo læra um sorg og hoyra søgurnar hjá øðrum og harvið kenna, at tey ikki eru einsamøll. Tí eru vit sera spentar um hesa verkætlanina," siga Oddvør og Lív.

Og á keiini á Skála endar Lív fyrsta partin av "Eg sakni teg" við at spyrja Jóruna: "Hvat heldur tú, pápi tín hevði ynskt fyri títt lív?"

Lív Højsted Horsdal er sálarfrøðingur hjá Beranum og vertur í poddvarpsrøðini "Eg sakni teg – eitt poddvarp um sorg", sum verður tøk á stroymingtænastum í mai 2022





# Hvat hevði tú gjørt, um eg small beint nú?

Eftir at starvsfólk í Betri í heyst tóku fyrstuhjálparskeið, kenna tey nú mannagongdina fyri grundleggjandi fyrstuhjálp – og vita tí júst, hvat skal gerast

Rútman til "Stayin' Alive" hjá BeeGees dukaði stútt og støðugt niður í bringukassan á fyrstuhjálpardukkunum hjá Reyða Krossi í heyst, tí undirvísarin greiddi frá, at tað er júst henda rútman, ið er rætti títtleikin til hjartalungahjálp.

Meðan starvsfólkini ímyndaðu sær, at dukkan var ein veruligur persónur, sum tey vóru komin fram á, vegleiddi undirvísarin gjølla um, hvussu tey skuldu bera seg at.

Fyri summi var tað fyrstu ferð, at tey lærdu fyrstuhjálp. Fyri onnur varð skeiðið nýtt til at uppfríska vitanina, tí hjá Betri er tað fastur táttur, at starvsfólkið við jøvnum millumbilum fer ígjøgnum eitt grundleggjandi fyrstuhjálparskeið.

Í heyst vóru tað starvsfólk hjá Betri Trygging og Betri Pensjón, sum tóku skeiðið.

- At skapa tryggleika er ein av hjartatáttunum í Betri. Bæði yvirskipað á samfelagsstøði og eisini í gerandisdegnum, tá ið ein óvæntað og lívshóttandi støða brádliga kemur í.

- Vit vilja geva starvsfólkum okkara førleikar til at handla, um onkur brádliga smellur. Tá ið lívið á næstanum er í vanda, skal starvsfólkið hjá Betri kunna traðka til og veita grundleggjandi fyrstuhjálp, sigur Ingunn Eiriksdóttir, forstjóri í Betri Trygging.

Appin Renn fyri lívi

# Kanst tú fara at hjálpa?

Nei Ja

Tú hevur bara fá sekund at umráða teg í, tá ið appin "Renn fyri lívi" boðar frá. Kanst tú sleppa øllum, renna avstað og møguliga bjarga lívinum á viðkomandi, sum beint nú hevur tørv á fyrstuhjálp – tætt við, har tú ert?

Appin er genial, og tí vildi Betri sjálvandi stuðla, fyri at henni skuldi vera lív lagað.

Níggju fólk fáa boðini frá Alarmsentralinum, og trý tey fyrstu at svara ja fáa síðani boð um, hvør uppgáva teirra er, og hvør adressan er, har onkur hevur hjálp fyri neyðini.

Ein fær boð um at renna beint á staðið og fara at geva fyrstuhjálp.

Næsti fær boð um, hvar tættasti hjartastartarin er, og at fara eftir honum á vegnum.

Seinasta fólkið fær til uppgávu at taka sær av møguligum skelkaðum hjástøddum fólkum, vegleiða sjúkrabilin og annars hjálpa til.

Øll, sum hava gyldugt fyrstuhjálparskeið, kunnu skráseta seg og vera við til at renna fyri lívi.

Eftir seinasta fyristuhjálparskeið vóru fleiri starvsfólk í Betri, sum meldaðu seg til skipanina.

*"Eg ivaðist ikki í at melda meg til. Um eg ella onkur av mínum skuldi fingið hjartasteðg, hevði eg viljað, at onkur traðkaði til og vildi hjálpa."*

GUÐRUN L. JOENSEN
RÁÐGEVI Í BETRI PENSJÓN




## Ársins fyrstuhjálpari og samarittarnir

Vit stuðla teimum, sum skapa tryggleika í Føroyum, og mongu seinastu árini hevur Betri havt sera gott samstarv við Reyða Kross.

Reyði krossur varðar av samarittunum, ið altíð eru klárir at hjálpa, tá ið stór tiltøk eru í landinum.

Hartil letur Reyði Krossur hvørt ár Ársins fyrstuhjálpara eina virðisløn, sum Betri stuðlar.

Sjálvandi. Tí jú fleiri duga fyrstuhjálp, jú tryggari eru vit øll.

Tað snýr seg um gerandistryggleika. Og gerandistryggleika stuðla vit fegin.

## Visti tú?

Renn fyri lívi hevur verið aktiverað 49 ferðir síðani 28. oktober 2020, tá ið hon varð sett í verk

Í 2021 varð skipanin aktiverað 36 ferðir

367 fyrstuhjálparar eru skrásettir í skipanini

Seinastu árini hevur Betri latið stuðul til 40 hjartastartarar, ið nú hanga kring landið

# Vit kunnu ikki angra okkum grøn

Vit vita tað. Vegurin fram er grundaður á varandi orkukeldur, endurnýtslu og grønar loysnir. Umleggingin má koma nú, og vit mugu øll gera okkara, tí vit kunnu ikki angra okkum grøn. Betri Trygging hevur tikið fyrstu stigini á grønu leiðini og leggur seg støðugt eftir at hava umhvørvið við í øllum loysnum okkara.





**Nýggj, grøn strategi**

Nýggja strategiin hjá Betri Trygging, sum snýr seg um komandi fýra árini, varð løgd fram í 2021.

Eitt av høvuðssporunum er "Burðardygd". Tað merkir, at tað nú er sligið púra fast, at vit skulu leggja okkum eftir at minka um $CO^2$-útlátið og hugsa um grønar loysnir. Hetta er ein spennandi arbeiðssetningur fyri dugnaligu starvsfólkini, sum hvør á sínum øki hava lagt ætlanir um, hvussu góða strategiin kann vísast í verki.

**Endurnýttir eykalutir**

Stórur partur av skaðunum, sum vit viðgera, eru bil-skaðar. Fyri at minka um oyðsl og óneyðuga stóra framleiðslu av eykalutum, fóru vit av álvara undir at umvæla, heldur enn at skifta út – og at endurnýta eykalutir.

Hetta skiftið til endurnýtlsu gongur sera væl, og bæði verkstaðir og kundar hava tikið væl ímóti broytingini.

Tað er jú beinleiðis oyðsl at tveita góðar og virkisførar lutir burtur, fyri síðani at keypa nýggjar. Tað skilja øll og taka eisini væl undir við tí.

Tá bilar nú koma inn, verður í hvørjum einstøkum føri mett um, hvørt tað er skilagott og trygt at umvæla tað, sum er farið – og í øðrum lagi, um tað riggar at endurnýta eykalutir.

Tað er betur. Bæði fyri bilin, fyri trygdina – og fyri umhvørvið.

**El-bilar**

Hjá Betri Trygging eru tað serliga sýnsfólkini, sum koyra nógv kring landið, tá teir fara út at sýna skaðar.

Í 2021 kom annar el-bilurin í túnið, eins og løðistøðir eru settar upp.

– Vit hava staðfest, at el-bilarnir sum heild roynast væl, og sýnsfólkini eru væl nøgd við bilarnar. Tey siga, at el-bilarnir hava góðar koyrieginleikar, kraft og komfort, greiðir Annika á Heygum, leiðari fyri skaða-økið, frá.

So hvørt, sum bilarnir skulu skiftast út fyri aldur næstu árini, verða el-bilar keyptir í staðin. Á henda hátt leggja vit um til umhvørivsligar loysnir og varandi orku uttan tó at økja óneyðugt um nýtsluna.

**Smáar dagligar gerðir**

Mangir løkir smáir, gera stórar áir, sigur orðafellið, og tað ásanna vit eisini. Smáu, dagligu gerðirnar hjá starvsfólkunum hava stóran týdning fyri samlaðu um-leggingina.

Vit leggja okkum eftir at printa minni út, at skilja ruskið, at sløkkja eftir okkum og eingi einnýtisíløt eru longur at finna hjá Betri Trygging. Vit leggja okkum sum heild at minka um nýtsluna á øllum økjum.

**Kantinan**

Eisini starvsfókini í kantinuni hava fingið sum arbeiðs-setning at hugsa grønt, burðardygt og heilsugott, og ta uppgávuna loysa tær til ug.

Tað merkir, at vit eta eftir árstíðunum, at vit royna at eta stuttfluttan mat og at vit hvønn fríggjadag eta restir fyri at minka um matoyðsl.

*"So hvørt, sum bilarnir skulu skiftast út fyri aldur næstu árini, verða el-bilar keyptir í staðin"*

ANNIKA Á HEYGUM
LEIÐARI FYRI SKAÐAØKIÐ

# Bacalao – eitt paradís fyri tey aktivu



Fleiri og fleiri ítróttarfelagsskapir leggjast aftur at spírandi umhvørvinum á Bacalao í Havn. Betri hevur stuðlað Skatefelagnum og Havnar Klintrifelag við til samans 145.000 krónum til høli og útgerð

## Skating er nú olympiskur ítróttur. Dreymurin er at fáa føroyska luttøku, og tað skal Skateparkin á Bacalao millum annað virka fyri. Betri hevur stuðlað virkseminum á Bacalao við í alt 145.000 krónum í 2021



Tað sær ikki út av nógvum uttanfrá, men tá ið tú kemur innum, letur ein heilur heimur seg upp. Vit eru á Bacalao. Ráa umhvørvið her talar til fólk, ið dámar at bjóða sær sjálvum av og ikki ræðist eitt adrenalin-kick, tí her kanst tú gera kickflip, ollie, frontside 180's og øll hini skate-triksini, og so kanst tú eisini klintra í nýggju klintrihøllini og venja parkour – eitt tiltrongt innandura paradís fyri føroyingar, sum dáma at vera aktivir.

"Høvdu vit havt hendan møguleikan, tá ið vit vóru yngri, so høvdu vit verið tveir øgiliga glaðir dreingir, siga teir báðir Gunnar Poulsen, formaður í Havnar Klintrifelag, og Ólavur Thorsteinsson, formaður í Skatefelagnum, tá ið vit hitta teir til eitt prát um spírandi umhvørvið á Bacalao.

"Og er tað drívmegin?" forvitnast vit.

"Ja, 13-ára gamli eg hevði elskað at havt eitt stað sum hetta," svarar Ólavur. Hann var við, tá ið Skatefelagið varð stovnað í 2016 við tí fyri eyga at skapa eina innan-dura park til tey, sum dáma at hava nógva ferð og hjól undir fótunum. Síðani tá hevur hann verið sjálvboðin sum formaður og samskipari, líka sum øll hini, sum eru knýtt at virkseminum, eisini eru sjálvboðin í bæði Skatefelagnum og Havnar Klintrifelag.

"Og tað er eisini bara so ómetaliga gevandi at síggja børn og ung vera part av einum sterkum felagsskapi her, samstundis sum tey menna seg ítróttarliga sum einstaklingar," leggur hann afturat.

### Ikki longur á gøtuni – og tað er gott

Sjálvur er Ólavur í dag í old boys bólkinum, men er ikki so aktivur á brettinum fyri tíðina, tí hann í fjør breyt albogan í høllini.

"Tað er vandin, tá ið tær dámar at buldra," flennir hann. "Men tað er kanska eisini ein partur av tí, sum ger, at mann heldur, tað er stuttligt. Summum dámar bara, tá ið tað er eitt sindur av vanda á ferð. Og fyri børn og ung, sum eisini kunnu hava tørv á einum adrenalin-kicki, so hugsi eg, at tað er ómetaliga gott at kunna fáa nøktað tann tørvin í eini skatepark, har tað er trygt og altíð onkur vaksin til staðar, heldur enn á gøtuni," leggur hann meiri álvarsliga afturat.

### Olympiskir dreymar

Skating varð fyrstu ferð praktiserað í 1940'unum, og hevur verið í Føroyum síðani í 80'unum, men tað hevur higartil altíð verið ein summarítróttur, har tú bara hevur kunnað verið aktivur tveir mánaðir um árið.

"Tað var ein forðing fyri at menna talent, tí tú kundi flyta teg ordiliga nógv um summarið, og so datt tað niðurfyri aftur um veturin," sigur Ólavur. "Og tí hevur tað alt at siga, at vit nú hava fingið tak yvir høvdið."

Undir olympisku leikunum í Tokyo í fjør varð skating fyrstu ferð viðurkend sum ein olympiskur ítróttur. Hetta orsakað av alsamt vaksandi áhuganum fyri urbanum ítrótti.

"Tá ið eg gangi her niðri, síggi eg eina rúgvu av sera lovandi talentum. Tað eru nøkur av teimum heilt ungu millum 11 og 14 ár, sum byrjaðu, tá ið høllin kom, sum nú eru so mikið væl fyri, at eg faktiskt byrji at tora droyma um luttøku í OL," sigur Ólavur, sum eisini fortelur, at Skatefelagið hevur samstørv í útlondum, sum taka sær av teimum føroysku skatetalentunum.

Fyri at halda so nógvum til sum gjørligt er limagjaldið fyri nýtslu av skateparkini sett rættiliga lágt, sigur Ólavur, sum fortelur, at hann heldur ikki, at skating er ein líka viðurkendur ítróttur millum foreldur, sum fótbóltur og hondbóltur er, og tí má limagjaldið haldast niðri. Og tí er tann stuðulin, felagið fær, avgerandi fyri, at virksemið kann halda fram.

"Tað kom sera væl við hjá okkum at enda árið í fjør við stuðlinum frá Betri. Faktiskt veit eg ikki ordiliga, hvat vit høvdu gjørt uttan," sigur Ólavur Thorsteinsson at enda.

Betri stuðlaði Skatefelagnum og Havnar Klintrifelag við 145.000 krónum í 2021. Pengarnir fara millum annað til at rinda fyri høli og útgerð til feløgini.



Stórar upphæddir til føroyska granskingarumhvørvið

# Vit styrkja vitanarsamfelagið Føroyar

Gransking er eitt øki, sum Betri leggur stóran dent á, tá ið stuðul skal útlutast. Í fjør læt Betri í alt tvær milliónir til granskingararbeiðið í Føroyum

Hvørja ferð ein granskari setur sítt síðsta punktum í eina granskingarverkætlan, so er tað eitt sindur sum, at hon leggur ein brikk aftur at einum stórum putlispæli. So líðandi vísir myndin seg, og vit skilja meir, enn vit gjørdu frammanundan.

Granskingarputlispælið byrjaði fleiri túsund ár áðrenn Kristus, tí vit menniskju hava til alla tíð havt eina trongd at skilja og vita meir. Meir um, hvussu heimurin hongur saman, og hvussu menniskjakroppurin virkar – og hendan trongdin er í veruleikanum grundarlagið undir øllum tí, vit vit vita í dag, og ikki minst undir øllum tí, sum ger okkum før fyri at liva leingi og liva væl; læknavísindini, samfelagsvísindini, tøknini. Uttan forvitnið og trongdina at skilja meir høvdu vit ikki heiligvág móti lívshættisligum sjúkum. Vit høvdu ei heldur flogfør, ljós í peruni ella hita í húsunum.

Og tað er, sum veksur hetta risastóra putslispælið seg størri og størri fyri hvørja ferð, ein granskari leggur ein brikk aftur at myndini. Úr hvørjari granskingarverkætlan reisast uppaftur fleiri spurningar – jú meiri vit vita, jú minni vita vit, kanst tú siga. Og tí verður arbeiðið at granska aldrin liðugt. Og tí er tað umráðandi at stuðla gransking.

### Føroysk granskingarumhvørvi í blóma

Ein partur av pengunum, ið verða latnir til gransking, teir enda her. Á Hoyvíksvegnum í Havn. Tá ið tú trínur inn um dyrnar her á Granskingarsetrinum, trínir tú inn í miðdepilin av føroyskari gransking. Granskingarsetrið iNOVA er úrslitið av einum samstarvi millum privatar og almennar fyritøkur, sum hava sum endamál at styrkja vísindaliga undirstøðukervið í Føroyum, greiða tey frá.

"So tað er her, tit royna at finna útav, hvar brikkarnir í putlispælinum skulu liggja?," spyrja vit.

"Ja, soleiðis kunnu vit kanska eisini siga tað," svara tey. Granskingarsetrið iNOVA er eitt serstakt vísindaligt umhvørvi. Samansetingin av privatum og almennum fyritøkum, sum granska undir sama taki, gevur betri atgongd til framkomin tól og eitt fjølbroytt samstarv millum føroyskar granskarar. Her granska tey í fiski, koronu, ítrótti, genetikki, kemi, heilsuvísindum, mati og havvísindum. Millum annað – tí listin av spurningum, sum granskarar hvønn dag royna at svara her á Hoyvíksvegnum, er langur.

### Stórar upphæddir til føroyska gransking

Tá ið Betri í fjør gjørdi av at tvífalda samlaðu stuðulsupphæddina úr 5 milliónum upp í 10 milliónir, var tað millum annað fyri at kunna veita uppaftur meiri stuðul til føroyska gransking. Í 2021 læt Betri 2 milliónir til føroyska gransking – hetta er ein av teimum størstu upphæddunum, ein føroysk fyritøka hevur latið føroyskari gransking.

"Við at veita stuðul til granskingarverkætlanir eru vit við til at styrkja um granskingarumhvørvið og menna virðismiklar førleikar í Føroyum, samstundis sum úrslitini av granskingarverkætlanunum flyta Føroyar longur fram á leið. Tað er eftir okkara tykki týdningarmikið at menna vitanarsamfelagið Føroyar."

Og tað kemur sanniliga samfelagnum til góðar, tá ið pengar verða latnir til stuðul. Tórunn Højgaard Ósá kannar millum annað, hvat er serligt við nevrologiskum sjúkum hjá føroyskum børnum. May-Britt Skoradal kannar typu-2 diabetes í Føroyum. Og Elsa D. Johannessen kannar umstøðurnar fyri palliativari umsorgan í Føroyum. Hetta eru millum aðrar verkætlanir, sum Betri stuðlaði í 2021.

**i** Til 31. mai 2022 ber til hjá føroyskum granskarum at søkja um pening úr Betri Stuðulsgrunninum. Treytin er, at granskingin er føroysk, og at hon er til gagns fyri føroyingar sum heild.

## Koyr. Bara. Alt annað er býtt




Betri Trygging er ein av høvuðsstuðlunum hjá Ráðnum fyri ferðslutrygd, og tað hava vit verið, síðani RFF var stovnað. Eitt av størstu átøkunum í 2021 snúi seg um gáloysni í ferðsluni

Ein lýsingafilmur varð framleiddur fyri at seta gáloysni í ferðsluni á breddan.

Hann snýr seg um alt tað, tú gert, sum einki hevur við koyringina at gera. Til dømis:

- Tú tosar í telefon ella skrivar/ lesur sms
- Tú innstillar útvarp ella tónleik
- Tú tekur okkurt upp av dúrkinum
- Tú etur, drekkur ella roykir
- Tínir tankar eru aðrastaðni

Gáloysni er ikki nóg væl dokumenterað í føroysku hagtølunum, men í grannalondum okkara vísa kanningar, at gáloysni er millum vanligastu orsøkir til ferðsluvanlukkur.

**50%**
av øllum deyðsvanlukkum í donsku ferðsluni henda av gáloysni





# Betri ferðslutrygd

Hjálmar til fyrstafloksbørn, endurskin, ferðslufrálæra til 8. flokkar í landinum, undirvísingartilfar til fólkaskúlan og mangt annað. Hetta er nakað av tí, sum Betri Trygging framleiðir, letur og stuðlar í samstarvi við Ráðið fyri ferðslutrygd. Í summum førum bara vit, í øðrum førum saman við øðrum stuðlum, ið eisini vilja fremja trygd í ferðsluni.

Grundarlagið hjá Betri Trygging er at skapa tryggleika í Føroyum, og ein støðugur vandi lúrir í ferðsluni. Tí gera vit nógv við hetta økið.

Tað hava vit gjørt síðani 1976, tá ið vit vóru ein av stigtakarunum til Ráðið fyri Ferðslutrygd.

Tað gera vit framvegis í 2021. Og tað fara vit áhaldandi at gera frameftir. Tí eingin skal doyggja ella fáa skaða í ferðsluni.



# IDD - License to work



Í Evropa kanst tú ikki selja tryggingar og ráðgeva í tryggingarviðurskiftum, um tú ikki hevur staðið sonevndu IDD-krøvini. Eingi slík krøv eru í Føroyum, men kortini hava allir ráðgevar hjá Betri Trygging og Betri Pensjón staðið strongu próvtøkuna

Vit vilja vera við á odda, og ein máti at gera tað er at liva upp til strongu krøvini, ið umheimurin setur. Í Evropa verður IDD-prógvið roknað sum arbeiðsloyvi. Stendur tú ikki próvtøkuna, sleppur tú ikki at arbeiða.

Í 2021 fóru allir ráðgevarnir hjá Betri Trygging og Betri Pensjón tí til strongu próvtøkuna við góðum úrslitum.

Hetta merkir, at tá ið tú tosar við ein ráðgeva hjá Betri Trygging ella Betri Pensjón, tosar tú við ein góðkendan ráðgeva, ið lýkur evropeisku krøvini og hevur pappír upp á sínar førleikar. Allir ráðgevar okkara hava sostatt license to work.

Fyri at lúka IDD-krøvini skalt tú til eina próvtøku, sum vigar tína vitan, bæði praktiskt og ástøðiliga.

IDD stendur fyri Insurance Distribution Directive og varð sett í verk eftir fíggjarkreppuna í 2008. Høvuðsendamálið er at verja kundan við at tryggja honum útbúnar ráðgevar, ið veita somu neyvu ráðgeving, sama hvar kundin keypir sínar tryggingar.

IDD-próvtøkan skal endurnýggjast 3. hvørt ár. Á tann hátt kunnu kundar okkara altíð vera vísir í, at ráðgevarnir liva upp til nýggjastu vitanina og krøvini.



Traðka til, tá ið harðast leikar á

# Gera Suðuroynna tryggari

Fjarstøðan millum tilbúgvingina og tann, sum er í neyð, er størri uttan fyri meginøkið. Tí er tað ein ómissandi tryggleiki hjá suðuroyingum at hava bjargingarfólk, sum traðka til, tá ið á stendur. Betri hevur stuðlað Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag við 200.000 krónum í 2021.



# Betri hevur stuðlað Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag við 200.000 krónum í 2021. Fyri pengarnar hevur felagið keypt trygdarútgerð til leitingar á sjógvi og landi

Veðrið er av tí allarringasta, og alt húsið svevur, tá ið telefonin ringir. Tað er vakttelefonin hjá bjargingarfelagnum, og Niels Petur er skjótur upp at kunna seg um støðuna, tí talan kann vera um lívsvanda, og tá er at vera skjótur. Hann ger útgerðina til reiðar og tilkallar tey bjargingarfólk, sum eru neyðug til uppgávuna.

"Hvørja ferð, eg verði kallaður til ein hjartasteðg, verði eg mintur á, hví eg geri hetta," sigur Niels Petur Midjord.

Niels Petur er sjómaður og burtur 4 vikur í senn. Men tá ið hann er heima, er hann á vakt 24 tímar um samdøgrið. Niels Petur er formaður í Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag, og tað hevur hann verið seinastu 12 árini. Bara seinastu tríggjar vikurnar hava tað verið boð eftir honum til hjartasteðg í oynni tvær ferðir.

"Minuttirnir kunnu bjarga lívinum á tí, sum fær hjartasteðg, og tí ber tað ikki til at bíða eftir sjúkrabilinum av Tvøroyri, tá ið eitt hjarta steðgar í Sumba," sigur Niels Petur, sum altíð hevur hjartastartara uppi á sær.

**Drivin av at hjálpa øðrum**

Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag hevur einar tíggju aktivar limir, og virksemið hjá felagnum fevnir eisini um leiting eftir fólki, at fyribyrgja stormskaðum, sleiping og at hjálpa sløkkiliðnum.

"Sum sonur til ein sløkkiliðsleiðara er mann kanska ávirkaður heimanifrá. Eg havi í øllum førum altíð havt eina trongd at hjálpa øðrum," sigur Niels Petur. Og at hjálpa øðrum er ein løn í sær sjálvum, sigur Niels Petur, sum seinastu 12 árini hevur verið á vakt 24 tímar um samdøgrið, tá ið hann er í oynni. Eitt arbeiði, hann ger uttan at fáa eina krónu afturfyri, tí alt arbeiðið hjá Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag er nevniliga sjálvboðið.

"Tað er ein heilt serligur felagsskapur millum okkum í felagnum, og eg eri virkuliga so góður við alt felagið. Vit eru røsk at hjálpa hvørjum øðrum eisini, um á stendur. Stendur onkur okkara uppsteðgaður, so traðka onnur til beinanvegin. Vit eru sum ein familja, og tí er tað eisini umráðandi fyri meg at ansa væl eftir mínum fólkum," sigur hann.

Í fjør fekk Suðuroyar Sunnar Bjargingarfelag 200.000 krónur frá Betri, sum Niels Petur hevur brúkt til at syrgja fyri trygdini hjá sínum bjargingarfólkum.

"Hesir pengarnir komu so heilt ómetaliga væl við. Vit hava keypt vatntættar arbeiðsdraktir, sum bjargingarfólkini fara í, tá ið tey arbeiða á sjónum. Tað merkir, at vit kunnu kenna okkum heilt trygg, tá vit leypa á sjógv. Eisini hava vit fyri hesar pengarnar keypt tráðleysa radiokommunikatión til okkara hjálmar, sum eisini ger, at vit eru í minni vanda, tá ið vit gera okkara arbeiði," sigur hann.

Bjargingarútgerð er kostnaðarmikil, og hjá einum sjálvbodnum felag, kemur hvørt oyra væl við.

"Okkara verkætlan hevði snøgt sagt ikki hingið saman uttan hesar pengarnar," sigur hann.

**Ein ómissandi tryggleiki hjá suðuroyingum**

Niels Petur er ikki nógv fyri at siga nakað ilt um Suðuroynna, sigur hann. Men tað er bara ikki tað sama, sum hjá teimum norðanfyri, má hann ásanna. Tað er ofta størri fjarstøða millum tilbúgvingina og tann, sum er í neyð. Tí er tað ein ómissandi tryggleiki hjá borgarunum í oynni at vita, at bjargingarliðið traðkar til dag og nátt og í øllum veðri.

"Eingin lønarupphædd hevði uppvigað kensluna av at hjálpa sínum medborgarum," sigur Niels Petur og takkar fyri stuðulin, sum ger tað møguligt hjá honum og hinum bjargingarfólkunum at traðka til, tá ið harðast leikar á.

# At *stuðla* er okkara ábyrgd

Fremsta endamálið við Betri Stuðli er at skapa tryggleika í Føroyum

Betri Stuðul veitir stuðul eftir umsókn, og treytin fyri at fáa stuðul er, at tað, sum tú søkir um, antin fyribyrgir skaða ella sjúku – ella er gagnligt fyri føroyska samfelagið.

Undan jólum lata vit hartil sonevndu adventsgávurnar, har vit óbiðin stuðla samfelagsgagnligum átøkum ella felagsskapum.

Aftur at hesum stuðlinum kemur stuðulin til ítrótt og frítíðarítriv kring alt landið umframt dystarklæði, steyp, kappingar o.s.fr.

Sum størsta fíggjarsamtak í landinum vita vit, at vit hava sera stóra ábyrgd, og vit vilja fegin lata kundar og Føroya fólk fáa gagn av tí, vit hava.

**Saktans við Dánjal á Neystabø og Búa Dam**
Sjónvarpsfilmar til børn

**ADHD**
Ráðgeving og gransking

**Krígssavnið í Vágum**

**Spastikarafelagið**

**Verkætlan um sálarligt umhvørvi**
Annika Helgadóttir

**Argja Bóltfelag**
E- fótbóltur

**Krabbameinskanning viðvíkjandi tvøsti og spiki**
Turið Hammer

**Veltan**
Lívdálar at verja grønmeti

**Lions Club Tórshavn**
Ólavsøkuframsýning

**Kollafjarðar Ítróttarfelag**
Útgerð

**Stuðulsgrunnurin fyri KRIS**

**Víkingaskipið í Hovi**

**GHM 100 ár**

**Pápar í Føroyum**
Firouz Gaini

**Fleirmælt børn**
H. Petersen, S. Rasmussen

**Alzheimersfelagið**

**Hjartafelagið**

**Nes sóknar Musikkskúli**

**Arkitektafelagið**

**Kyn**
Stuttfilmur um fyribyrging

**Neurologiskar sjúkur og svøvnólag hjá børnum**
Tórunn Ósá

**Jarðfrøðilig loysn at fáa null útlát**
Rakul Maria Johansen

**Sjúklingahotel Tórshavn**
Hjálpartól v.m.

**Sjálvbodna koronaráðgevingin**

**Reyði Krossur Føroya**
Landsinnsavning

**Samtalubókin "Mín lívsleið" Alzheimer**
Høgni Waag Høgnesen

**Barnabati**
Í menniskjum góður tokki

**Team Rynkeby**

**Reyði Krossur**

**Samarittar**

**Reyði Krossur**
Ársins fyrstuhjálpari

**Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag**
Trygdarútgerð til bát

**Kappróðrarsamband Føroya**
Bjargingarvestar

**Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag**
Trygdarseðlar til bjarging á landi

**Kollafjarðar Bátafelag**
Bjargingarvestar

**Byrsumúli**
Hjartastartari

**Klettagarður**
Skáp til hjartastartara

**Náttarravnarnir**

**Felagstilbúgving í Suðuroy**
Stigabil og tangabil

**Løgreglan í Føroyum**
Temadagur um eld

**Føroyar móti Krabba**
Landsinnsavning

**Skúlaleikir**
Høvuðsstuðul í trý ár

**Blái Krossur**
Listterapi

**Colitis Crohn**
Lýsingarátak um sjúkuna

**Kropslig venjing**
Diabetes 2: Mai-Britt Skoradal

**Kanna kolestorol í blóðinum**
Sanna á Borg

**Palliativ care**
Elsa Joan Djurhuus

**Jodkanning**
Herborg Johannesen

**Føroya Náttúru- og umhvørvisfelag**

**Heilafelagið**

**Klintrihøllin**

**Skatehøllin**

## Yvirlit yvir tað, sum Betri m.a. stuðlaði í 2021

betri

# Saman eru vit *Betri*

betri banki betri trygging betri pensjón betri heim